Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juni 2008

Vitjan av Jesus Revolution

Mánadagin 19. mai kom eitt lið hjá Jesus Revolution til Føroya á vitjan. Við á ferðini vóru tilsamans sjey ungfólk úr Noregi, Týsklandi, Belgia, Rumenia og Marita Jøkladal úr Føroyum.

Liðið hevur luttikið í ymiskum tiltøkum og havt konsertir kring landið.

Týskvøldið 27. mai var Lívdin við til at skipa fyri einum missiónstiltaki í Hebron á Argjum, og hóskvøldið 29. mai var konsert í Badmintonhøllini.

Annars vóru konsertir í Sørvági, Porkeri, Klaksvík, Skálafirði og í Havn.

Røkka út til okkara samtíð

2. Tim. 4:1-5 sigur: "Eg vitni fyri Gudi og fyri Kristi Jesusi, sum skal døma livandi og deyð, og við opinbering og ríki Hansara: Prædika orðið, ver íðin í tíð og í ótíð, sannfør, revsa, áminn, við øllum langmóði og lærdómi! Tí tann tíð skal koma, táið tey ikki vilja vita av hini heilnæmu læru, men eftir sínum egnu lystum taka sær lærarar í hópatali, alt eftir sum tað kitlar tey í oyruni; og tey skulu venda oyrunum frá sannleikanum og venda sær til ævintýr. Men ver tú edrúur í øllum, líð ilt, ger verk evangelists, fullfør tænastu tína!"

Um vit skulu røkka okkara samtíð, so mugu vit byrja vit við boðskapinum. Tað er ein bíbilskur boðskapur, sum vit bera fram. Um vit skulu røkka okkara samtíð, so má boðberin eisini hava ein bíbilskan lívsstíl. Og um vit skulu røkka okkara samtíð, so mugu vit brúka eina bíbilska leikætlan, sum er viðkomandi fyri okkara samtíð. Við øðrum orðum: Tá ið boðskapurin undir Heilaga Andans leiðslu verður borin rætt fram av einum boðbera, sum livir eitt rættvíst lív á ein hátt, sum er viðkomandi fyri okkara samtíð, so fer Gud at broyta okkara broytingartíðir við Sínum óbroytandi boðskapi. Má Harrin signa tykkum í tænastu tykkara fyri Hann í summar!

Jógvan Zachariassen

Vinir í Lívdini

Torbjørg Jøkladal 75 ár

Týsdagin 1. apríl fylti Torbjørg Marita Jøkladal í Hoyvík 75 ár. Torbjørg er ættað úr Klaksvík og flutti í Kollafjarðardal í 1968, har hon saman við manninum rak Esso-støðina, seinni Statoil-støðina í Dalinum.

Í 2002 fluttu tey til Hoyvíkar og hava síðani verið knýtt at Lívdini. Torbjørg er enn ógvuliga virkin og arbeiðir nakrar tímar um vikuna í dagstovni í Havnini, har hon hugnar um børnini við bakstri. Hon er eisini rættiliga kreativ og hevur bundið nógv upp á børnini umframt verið við á framsýningum.

Í 1952 giftist Torbjørg við Bjarna Jøkladal úr Fuglafirði. Tey búðu fyrstu árini í Klaksvík. Tey eiga tveir dreingir: Ólavur og Bjarti. Barnabørnini eru átta í tali og langommu- og langabbasynirnir tveir.

Vit ynskja Torbjørg hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

Samkomufundur

Týskvøldið 17. juni verður samkomufundur á Brekku 3.

Leiðslan

Tillukku við brúdleypinum



Leygardagin 17. mai giftust í Betesda í Klaksvík Fríða Jákupsdóttir úr Havn, og Martin Sivertsen úr Klaksvík. Brúdleypið varð í hildið í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Fríða er dóttir Sunnvá og Jákup Jacobsen í Havn, og Martin er sonur Sigrid og Palla Sivertsen í Klaksvík.

Tillukku við barninum

Nita og John Sørensen í Hoyvík hava verið í Bolivia eftir soninum Davidi, sum tey hava ættleitt. David fylti trý ár tann 18. apríl, dagin eftir at foreldrini komu til Bolivia.

Nita og John eiga eisini sonin Róa.

Nýggir elstar í Lívdini

Á møtinum sunnudagin 11. mai vórðu tríggir nýggir elstar innsettir í Lívdini: Ólavur Jøkladal, Guttorm Joensen og Jóhan Syderbø.

Nú eru tilsamans sjey elstar í samkomuni. Hinir eru Jákup Jacobsen, Rúni Lómstein, Jens Wang og Jógvan Zachariassen.

Ólavur Jøkladal, Guttorm Joensen og Jóhan Syderbø

Ein bøn – eitt ynski hjá eini mammu

Harri, hjálp mær at geva mínum børnum tað besta – ikki teir bestu lutir, men tað besta av mær sjálvari, so at eg verji tey á góðum døgum sum ringum døgum, bæði teirra og mínum egnu.

Lær meg at góðtaka tey fyri tað, tey eru, og ikki bara fyri tað, tey gera – at hoyra, hvat tey siga, tí bert á tann hátt vilja tey lurta eftir mær. At eggja teimum til at stíla móti teirra málum – ikki móti mínum.

Lat meg geva teimum eitt heim, har virðing og falsloysi eru hornasteinar, og har tað er ivaleyst av plássi til kærleika og gleði undir loftinum. Hjálp mær at geva teimum mót til at vera sonn móti sær sjálvum, frælsi til at vera seg sjálv og trúgv til at líta á teg.

Lat meg uppala tey uttan at niðurgera tey, krevja góðan atburð uttan at gloyma mín egna og lata tey vita, at tey eru stórliga elskað, hvat tey enn gera.

Lat meg hava nóg mikið til at kunna geva teimum smáar samsýningar – ikki fyri tað arbeiði, tey hava gjørt, men bert fyri ta gleði, tey geva. Lat meg gera alt hetta við máta, so gleðin við at fáa skal hjálpa teimum at síggja gleðina av at geva.

Harri, lat teirra ábyrdarkenslu vera náturliga og ikki ein byrði. Lat mínar væntanir vera stórar uttan at gerast yvirfloymandi og lat meg rósa teimum við umhugsni, tá tað er uppiborið.

Hjálp mær at læra tey, at væl gjørt arbeiði er løn í sær sjálvum. Og tá tann tíð kemur, lat meg fagna teirra úrslit – sjálvt tey smáu – uttan á nakran hátt at taka nakað av æruni. Míni børn eru nóg stór æra í sær sjálvum. Fram um alt, lat meg grundfesta tey so væl í trúnni á teg, at eg trygt kann lata tey fara.

Í Jesu navni!

Tiltøk

Tiltøk á Brekku 3 í Hoyvík

(bygningurin aftan fyri MBM)

Undirvísing og "bøn og bønarskúli" eru týskvøld kl. 20.00

3. juni: Húsbólkar (einki møti)
10. juni: Bøn (Lív)
17. juni: Samkomufundur
24. juni. Húsbólkar (einki møti)

Heimasíða fyri tey ungu

Tey ungu í Lívdini hava eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er www.ung.livdin.fo

Bønarbólkur fyri kvinnur

Fyrsta leygardag í hvørjum mánaði savnast bønarbólkur fyri kvinnur.
Áhugað kunnu venda sær til Onnu Mariu Anthoniussen (tlf. 228826) ella Poulu Sørensen (220429).

Kjakfundur um trúgv og vísindi

Hósdagin 15. mai var kjakfundur í hølunum hjá Lívdini á Brekku um evnið "Trúgv og vísindi".

Tað vóru teir báðir Dánjal Jákup Jacobsen, Ph.D. í gagnnýttari støddfrøði, og Poul F. Guttesen, Ph.D. í gudfrøði og bíbilskari gransking, sum høvdu hvør sína framløgu um vísindaliga ástøðið, ið teir arbeiða á, og hvussu hetta ávirkar trúgv teirra.

Aftaná var høvi at seta Dánjal Jákupi og Poul spurningar, og møguleiki var hjá áhoyrarunum at taka lut í kjakinum. Fyriskipararnir av kjakfundinum vóru sera væl nøgdir við tiltakið. Eini 75 fólk komu til fundin.

Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

Sunnudagin 1. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Visión fyri barnaheimi í Uganda* *Talari: Ilda Lómstein*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00:	*Evni: "Við Kristusi"* *Talari: Ólavur Jøkladal*

Sunnudagin 8. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Glóðin – stutt innlegg*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00	*Evni: Opið evni* *Talari: Regin Guttesen*

Sunnudagin 15. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Opið evni*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00	*Evni: Leiðsla* *Talari: Jóhan Syderbø*

Sunnudagin 22. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Opið evni*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00	*Evni: "...men Gud gloymdi ikki Ísmael"* *Talari: Poul Guttesen*

Sunnudagin 29. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: UngLív luttaka*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00	*Evni: Opið evni* *Talari: Rúni Lómstein*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo